# 1 Innleiðsla

Eftirlønargrunnur Løntakaranna ("Lívsverk", "vit", "okkum" ella "okkara") er ein eftirlønargrunnur, ið fakfelagssamstørvini, Føroya Arbeiðarafelag, Landsfelag Handverkaranna og Føroya Fiskimannafelag, eiga í felag. Hevur tú eftirlønaruppsparing umvegis eitt av hesum fakfelagssamstørvum verður hendan røktað av Lívsverk, og viðgera vit í hesum sambandi persónupplýsingar um teg.

Sum meginregla er Lívsverk dátuábyrgdari av teimum upplýsingum vit viðgera um teg í sambandi við okkara røkt av tíni eftirlønaruppsparing. Hetta merkir so eisini, at títt fakfelag eisini er dátuábyrgdari av teimum upplýsingum, ið fakfeløgini viðgera um teg sum fakfelagslimin.

Lívsverk hevur skyldu til at tryggja trúnað, rættleika og atgongd á upplýsingum, vit viðgera um okkara limir, veitarar og starvsfólk, undir hesum eisini persónupplýsingar. Lívsverk tekur dátuvernd í størsta álvara og arbeiðir áhaldandi fyri at verja persónupplýsingarnar við at raðfesta trygd í øllum okkara arbeiði.

# 2 Samskiftisupplýsingar

Er ynski um at fáa meiri at vita um okkara dátuviðgerð av tínum persónsupplýsingum, kunnu tit seta tykkum í samband við okkum á ein av niðanfyri standandi hátt:

| Adressa | Telefonnummar | Teldupostur | Heimasíða |
|---|---|---|---|
| Stoffalág 17<br>100 Tórshavn<br>Føroyar | +298 312101 | livsverk@livsverk.fo | www.livsverk.fo |

Tú finnur fleiri upplýsingar um fakfelagssamstørvini og tilhoyrandi limafeløg á:

Føroya Arbeiðarafelag www.fafelag.fo

Landsfelag Handverkaranna www.lfh.fo ella www.handverk.fo

Føroya Fiskimannafelag www.fiskimannafelag.fo

# 3 Okkara dátuviðgerðir

## 3.1 Umsiting og røkt av limum og eftirlønaruppsparingum

**Endamál**: Endamál við viðgerðunum er at kunna eyðmerkja tey, ið hava eftirlønaruppsparing hjá Lívsverk. Endamálið er harumframt eisini at kunna útgjalda røttu eftirlønirnar til limirnar.

**Heimild**: Vit viðgera vanligar persónupplýsingar grundað á § 8, stk. 1, nr. 3 í dátuverndarlógini fyri at dátuábyrgdarin kann halda eina rættarliga skyldu sambært eftirlønarlógini. Viðgerð av viðkvæmum persónupplýsingum er grundað á § 12, stk. 1, nr. 3, fyri at dátuábyrgdarin kann halda sínar starvsrættarligu skyldur sambært eftirlønarlógini umframt sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum.

**Tey skrásettu**: Vit skráseta persónupplýsingar um limir í fakfelagssamstørvunum Føroya Arbeiðarafelag, Landsfelag Handverkaranna og Føroya Fiskimannafelag. Umframt fyrrverandi limir, ið hava eina eftirlønarkontu hjá okkum.

**Sløg av persónupplýsingum**: Vit viðgera vanligar persónupplýsingar, undir hesum navn, bústað, telefon nummar, teldupostbústað umframt upplýsingar um arbeiðsgevara, útbúgving og lærutíðarskeið. Eisini verða upplýsingar um lønar- og eftirlønarkontur skrásettar.

Vit viðgera viðkvæmar persónupplýsingar undir hesum upplýsingar um yrkisfelagsligt tilknýti (limaskap í fakfelagi). Harumframt kunnu vit viðgera upplýsingar um heilsustøðuna hjá limum í sambandi við útgjald av fyritíðarpensjón.

**Kelda**: Upplýsingarnar koma frá teimum fakfeløgum, ið eru limir í Lívsverk umframt frá TAKS.

**Varðveitslutíðarskeið**: Vit goyma upplýsingarnar so leingi ein hevur eina eftirlønaruppsparing hjá okkum.

### 3.2 Setan av starvsfólki

**Endamál**: Lívsverk má tryggja sær altíð at hava starvsfólk við teimum røttu førleikunum til virksemið hjá eftirlønargrunninum.

**Heimild**: Setanartilgongdin er neyðug fyri, at Lívsverk kann fylgja einum heimilaðum áhugamáli sambært § 8, stk. 1, nr. 6 undir hesum at finna fram til møgulig nýggj starvsfólk.

**Tey skrásettu**: Vit skráseta upplýsingar um skrásetta og møguligar aðrar tilvísingar, skrásetti sendir okkum saman við umsóknini.

**Sløg av persónupplýsingum**: Vit viðgera vanligar persónupplýsingar, sum umsøkjarin sendir okkum, undir hesum, navn, bústaður, telefon nummar og teldupostur, umframt aðrar upplýsingar viðkomandi sendir okkum, t.d. cv., próvtøl, myndir og aðrar upplýsingar.

**Kelda**: Sum meginregla koma upplýsingar frá umsøkjara. Vit kunnu í sambandi við setanartilgongdina leita eftir alment atkomuligum upplýsingum á alnótini umframt á sosialu miðlunum.

**Varðveitslutíðarskeið**: Um umsøkjarin ikki verður settur, verða upplýsingarnar varðveittar í 1 ár at rokna frá endanum av árinum, umsøkjarin søkir starvið.

## 4 Móttakarar av upplýsingum

Sum meginregla letur Lívsverk ikki upplýsingar víðari til triðjapart. Lívsverk nýtir tó útvaldar KT-veitarar í sambandi við veiting av skipanum og hýsing. Vit tryggja, at dátuviðgerðaravtalur eru gjørdar við KT-veitarar fyri at tryggja, at persónupplýsingarnar verða trygt og lógliga viðgjørdar samsvarandi dátuverndarlógini.

## 5 Tíni rættindi

Sum skrásettur hevur tú ávís rættindi, sum Lívsverk hevur skyldu til at fylgja.

Tú kanst seta teg í samband við okkum og fáa innlit í hvørjar persónupplýsingar, vit viðgera um teg. Somuleiðis kanst tú fáa skeivar ella manglandi persónupplýsingar rættaðar. Um tú ynskir, at tínar persónupplýsingar verða slettaðar, at Lívsverk avmarkar viðgerðina av tínum persónupplýsingum ella nýta tín rætt til dátuflutning, ella at mótmæla og steðga eini viðgerð av tínum persónupplýsingum, kanst tú seta teg í samband við okkum.

## 6 Broytingar í hesari dátuverndarkunning

Vit gera leypandi eina endurskoðan av dátuverndarkunningini fyri at staðfesta, um hendan skal dagførast ella tillagast.

Hendan dátuverndarkunning er seinast dagførd tann 13.09.2022.

## 7 Kæra

Um tú ynskir at kæra yvir okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum, verður tú vinaliga biðin um at senda okkum ein teldupost til livsverk@livsverk.fo og lýsa málið. Vit viðgera kæruna og venda aftur.

Tú hevur eisini rætt til at kæra til Dátueftirlitið í sambandi við tíni rættindi umframt okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum. Fyri nærri kunning um, hvussu tú kanst senda Dátueftirlitinum eina kæru, verður víst til heimasíðuna hjá dátueftirlitinum www.dat.fo